

KRINGVARP FØROYA

# Ársfrágreiðing

# 2021

# Kringvarpið er til
# fyri allar føroyingar

Vit taka tey mál upp, sum hava týdning fyri teg. Tí eru vit fremsti mentanarberi føroyinga. Endamálið hjá Kringvarpi Føroya er at veita eina public service-tænastu, sum savnar, undirheldur og ríkar.

# Innihald


| | |
|---|---|
| **Fororð** | **4** |
| **Framleiðsla** | **5** |
| **Álit** | **9** |
| **Aktuelt** | **13** |
| **Mentan** | **17** |
| **Ítróttur** | **22** |
| **Savnsgull** | **24** |
| **Átrúnaður** | **26** |
| **Ungdómurin** | **29** |
| **Børn** | **31** |
| **Tónleikur** | **34** |
| **Public Service** | **36** |



**Kringvarp Føroya**
**Ársfrágreiðing 2021**

Forsíðumynd Bjarni Árting Rubeksen
Myndir Bjarni Árting Rubeksen og egnar myndir
Uppseting Guðrið Syderbø




# Trýst á játtanina



Kringvarpið framdi stórar sparingar í 2021. Játtanin til stovnin, t.e. kringvarpsgjaldið, hevur verið óbroytt síðani 2016. Umflokkingar av einum stórum parti av starvsfólkahópinum til ein BA-stiga høvdu stórar eyka lønarhækkingar við sær í 2020 og 2021. Samstundis sum støðið á lønarútreiðslunum hækkaði varandi, minkaðu inntøkurnar frá gekkaspælinum. Uttan átøk fór raksturin í 2022 at geva eitt hall upp á stívliga 6 milliónir krónur. Leiðslan noyddist tí at taka tað harmiliga stigið at skerja starvsfólkahópin við 6,6 ársverkum. Harumframt varð avgerð tikin um at lækka framleiðslukostnaðin av ávísum sendingum, at minka um keyp av sendingum, at umleggja lisensir og at drýggja innkeyp av tøkni.

Kringvarpsleiðslan gjørdi landsstýrismannin í mentamálum og limirnar í løgtingsins fíggjarnevnd varugar við, at tað er neyðugt at leggja inntøkunar hjá Kringvarpinum í eina tryggari legu. Enn røkist tó ikki fyri nakrari loysn.

### Framsøkni gav úrslit

Kringvarpið helt framsøknu kósina í 2021. Ungdómsverkætlanin Biit framleiddi 23 ymiskar røðir til netið. Framsøkna arbeiðið hjá ungdómstoyminum førdi til, at tilfarið varð roynt í útvarpinum eisini. Hetta eydnaðist sera væl. “Gentuvesið” bleiv væl umtókt millum eldru lurtararnar, umframt at tónleika- og mentanarsendingarnar hjá ungdómstoyminum hava nógvar lurtarar.

Stóru dokumentarsendingarnar á Aktuelt – “Teir ómettiligu” og “Kongoránið” – góvu okkara tíðindafólkum møguleika at samstarva við tíðindafólk úr fleiri londum. “Kongoránið” gav atgongd til PPLAAF, sum varskógvar um viðurskifti í Afrika. Stórir altjóða miðlar sum BBC, Der Spiegel og Bloomberg vóru við í samstarvinum. Dokumentarurin avdúkaði, at fyrrverandi forsetin í Kongo, Joseph Kabila, hevði brúkt fólksins pengar at byggja sær sítt egna handilsveldi. Ein partur av pengunum fór eisini til Føroya, og illgruni var um hvítting av pengum.

Høvuðstíðindasendingarnar í útvarpinum hava nógvar lurtarar. Breddin, sum fer í dýpdina við journalistiskum evnum, bleiv sendur fyrrapart kl. 10. Hetta styrkti høvuðstíðindini á middegi og kl. 18 enn meira.

Orkan innan ítróttarøkið verður nú brúkt øðrvísi. Talið av beinleiðis sjónvarpsframleiðslum økist støðugt, nú vit eisini framleiða og senda landsdystir hjá kvinnum og monnum í hondbólti. Hetta gevur eitt økt arbeiðstrýst, men eisini nógvar spennandi uppgávur, sum okkara hyggjarar eru glaðir fyri.

Kringvarpið hevur øll árini lagt stóran dent á dygdargott, siðsøguligt tilfar. Stóra sendirøðin “Frá fyrsta Smirli til í dag – føroysk samferðslusøga í 125 ár” fór av bakkastokki og fekk góða undirtøku frá lurtarunum.

Meiri orka varð sett av at menna heimasíðuna og web-partin sum heild. Heimasíðan og sosialir miðlar verða frameftir ein meira drívandi megi, tá framleiðslurnar skulu røkka brúkarunum.

Koronufarsóttin hevði við sær, at fleiri av afturvendandi tiltøkunum vórðu avlýst. Kringvarpið samstarvaði tí við avvarðandi stovnar og feløg um alternativar útgávur av FMA og Geytanum. Í 2021 vóru tvær stórar innsavningar. Krabbameinsfelagið hevði eina innsavning í mars, og Kris/Sinnisbati høvdu eina í oktober.

### Framtíðin er óviss

Kringvarpið er tilvitað um ábyrgdina og týdningin, ið stovnurin hevur fyri føroyska málið, mentanina og fólkaræðið. Virksemi stovnsins er kjølfest í Kringvarpslógini og útgreinað í public service-sáttmálanum. Hóast public service-sáttmálin fór úr gildi 1. januar 2021, er ongin nýggjur sáttmáli undirskrivaður. Tað er eyðsæð, at fíggjarliga grundarlagið undir Kringvarpinum treytar, hvussu framsøkin komandi public service-sáttmálin verður. Landsstýrismaðurin í mentamálum hevur ásannað avbjóðingina at fáa politiskan meiriluta fyri, at ein prístalsjavning verður sett í gildi fyri Kringvarpið, og at játtanin kann fylgja við lønarvøkstrinum. Um ongin loysn verður funnin, verður Kringvarpið niðurlagað, so hvørt lønir og prísir hækka.

Hetta er ikki haldgott. Ávirkanin uttaneftir frá stóru stroymingarrisunum hevur ongantíð verið størri enn nú. Miðlavanarnir broytast, og føroyska málið, mentanin og savningarmegin eru undir trýsti. Tí er alneyðugt hjá Føroyum at hava eitt dygdargott føroyskt loftmiðlatilboð!

Við ynskjum um eitt gott ár fyri KVF og brúkarar tess.

**Ivan Hentze Niclasen,**
**kringvarpsstjóri**

# Framleiðsla





# Framleiðslan í tølum

**Aktuelt**
Útvarpstíðindi, Dagur og Vika, tíðindafundir, stuttdokumentarar og Breddin.

**Tónleikasendingar**
Tónleikasendingar í útvarpi og sjónvarpi, FMA og aðrar konsertir.

**Infotainment**
Orðið er heiti fyri sendingar, ið kunnu bólkast sum bæði “information” og “entertainment”. Hesar sendingar eru undir bólkinum Infotainment: Góðan Morgun Føroyar, sendingin Vikuskiftið, Ólavsøkuprát, Gekkurin, Summargestir o.l.

**Børn og ung**
Tilfar til ung á ungdómsmiðlinum Biit og í útvarpi og sjónvarpi. Barnaútvarpið og allar barnasendingar í sjónvarpi, bæði føroyskar og týddar.

**Átrúnaður**
Morgunlestrar, andaktir, guðstænastur, møti og sendingin Credo.

**Mentan**
Mentanarsendingar, Nón, siðsøga (t.d. Meg Minnist), samrøður, frásagnir (Við Tórði á túri o.l.), náttúrusendingar, dokumentarsendingar hóskvøld, framhaldssøgur, stuttsøgur, tónleikasendingar við samrøðum, ymsar sendingar um høgtíðir o.l.

**Ítróttur**
Ítróttasendingin í útvarpinum í vikuskiftunum, 3-2 í sjónvarpinum, frásagnir frá fótbólti og hondbólti, finalur í hondbólti, flogbólti, fótbólti, svimjing, badminton, borðtennis og judo, landsdystir í fótbólti og onnur føroysk luttøka í altjóða kappingum.

**Sendingar, sum falla uttan fyri bólkingina**
Tingvarpið í sjónvarpinum.

| Bólkar | Útvarp | Sjónvarp | Tilsamans |
|---|---|---|---|
| Aktuelt | 553 | 104 | 657 |
| Tónleikasendingar | 5.050 | 25 | 5.075 |
| Infotainment | 982 | 36 | 1018 |
| Børn/ung | 228 | 205 | 433 |
| Átrúnaður | 375 | 71 | 446 |
| Mentan | 1.353 | 143 | 1.496 |
| Ítróttur | 217 | 143 | 360 |
| **Samanlagt** | **8.758** | **727** | **9.485** |

Yvirlitið vísir einans føroyska framleiðslu

## Yvirlit yvir føroyskt framleitt tilfar til útvarpið



## Yvirlit yvir føroyskt framleitt tilfar til sjónvarpið



# Álit



# Hvat heldur fólkið?

Síðani februar 2016 hevur Spyr.fo regluliga kannað, hvussu tað stendur til við áliti føroyinga til Kringvarp Føroya og aðrar føroyskar miðlar. Álit er ein av fortreytunum fyri tilverurættinum hjá Kringvarpinum, og hetta er nakað, sum stovnurin arbeiðir miðvíst við at varðveita og betra.

500 fólk í aldursbólkunum 18-29, 30-44, 45-59 og 60-80 ár í øllum landinum verða sostatt regluliga biðin um at meta um, hvussu stórt álit tey hava á føroyskum tíðindamiðlum sum heild og á Kringvarpinum. Tílíkar spurnarkanningar skulu altíð takast við ávísum fyrivarni, tó kunnu afturvendandi spurnarkanningar sum hesar geva nakrar góðar ábendingar.

Álitisbarometrið gongur frá 1 upp til 7, sum er fult álit. Álitið er kannað 21 ferðir, og í seinastu kanningini vísti barometrið eina meting á 4,59. Heildarmyndin vísir, at álitisbarometrið hevur verið støðugt við onkrum smávegis sveiggi, síðani Spyr.fo byrjaði at gera hesa kanning fyri Kringvarpið. Talvan niðanfyri vísir samlaða álitið á føroyskum miðlum í mun til álitið á Kringvarpinum.

## Álitisbarometrið
Oktober 2021



## Álit á Kringvarpinum sum tíðindamiðil



## Álit á føroyskum tíðindamiðlum samanborið við álit á Kringvarpinum

Talvan vísir samlaða álitið á føroyskum miðlum í mun til álitið á Kringvarpi Føroya



# Aktuelt



# Støðan, sum hon er




**Stórar framleiðslur merktu árið**

Avbjóðingar vóru framvegis í 2021 við koronu, men í nógv minni mun enn í 2020. Hetta árið var annars merkt av størstu satsingini seinastu árini.

2121 byrjaði, sum tað skuldi, og vit høvdu eina vón um, at tað ringasta við koronu var lagt aftur um okkum. Tað gekk eisini væl líka inntil desember mánað, tá ein nýggj koronubylgja rakti okkum. Vit máttu taka Breddan av skrá og leggja alt arbeiðið um og arbeiða í føstum toymum. Tað hevði við sær stórar avbjóðingar á redaktónini, tí tað ber ikki til at flyta fólk millum vaktir vegna sjúku ella aðra fráveru. Royndirnar frá fyrstu koronubylgjuni gjørdu tó, at vit kundu seta gomlu tiltøkini í verk við sera stuttum skotbrái.

Eins og í 2020 legði Kringvarpið høli til tíðindafundir, tá lands- og heilsumyndugleikar skuldu boða frá nýggjum ella tillagaðum tiltøkum.

Árið var eisini merkt av, at fleiri størri tiltøk vórðu skipað uttan áskoðarar ella avlýst. Tað førdi við sær avbjóðingar, tá tað snýr seg um livandi og gott sjónvarp. Men tað, sum helst merkti árið mest, var tað stóra satsið við sendingunum 'Teir Ómettiligu' 1 og 2 og 'Kongoránið', sum kom í kjalarvørrinum. Orka var ikki til nógv annað hetta tíðarskeiðið.

**Sjónvarp**

Stóru broytingarnar í Degi og viku í 2019 høvdu avbjóðingar við sær í 2020, sum tað eisini varð nevnt í ársfrágreiðingini í fjør. Í 2021 vórðu nakrar broytingar gjørdar í Studio 2, haðani Dagur og vika verður framleidd. Hetta er ein liður í støðugu gongdini at betra um sendingina, og tað fara enn broytingar fram. Útgangsstøðið er tó framvegis tað sama sum í 2019, nevniliga at samansjóða tíðindi og ein meira perspektiverandi part.

Vit løgdu okkum eftir at hava fleiri stutt-dokumentarar í ár enn í fjør, men tað eydnaðist bara lutvíst, tí avgerð varð tikin um at gera tvær stórar sendingar, tær fyrstu vóru 'Teir Ómettiligu' 1 og 2 og síðani 'Kongoránið'. Hetta gav ikki rúm fyri fleiri stutt-dokumentarum, sum tískil bara gjørdust tríggir í tali.

Í januar mánaði varð amerikanski forsetin Joe Biden tikin í eið, men tað gekk ikki eftir ætlan, tá mótstøðufólk lupu á Capitol Hill. Tí gjørdu vit av at gera nógv burtur úr degnum og sendu beinleiðis frá hendingini og brúktu eitt heilt kvøld til endamálið. Hetta kann ikki bólkast undir stutt-dokumentarar ella annað, men er nakað, vit altíð mugu vera klár til. Hetta var eisini ein sending, sum var á fleiri pallum á Aktuelt. Í útvarpinum viðgjørdi Breddin innsetanina og amerikanskan politikk frá klokkan 17, og í sjónvarpinum kom Dagur og vika á skránna klokkan 16:30, har gestir umrøddu støðuna í USA, og sent varð beinleiðis frá hátíðarhaldinum.

**Stutt-dokumentarar**

Í 2020 fóru vit undir at menna eina skipan við stutt-dokumentarum. Hesir kunnu vera í endanum av Degi og viku, um longdin er millum átta og fimtan minuttir. Verða teir longri, verða teir lagdir aftan á Dag og viku. Endamálið er at seta nøkur serlig mál á breddan, sum verða viðgjørd nærri og perspektiverað. Hetta er eitt millumting millum tey stuttu tíðindainnsløgini og tær longu sendingarnar, sum taka langa tíð at framleiða. Tílíkar sendingar




eru eisini mennandi fyri tað einstaka tíðindafólkið at framleiða og skulu setast inn í vaktarskipanina fyri at fáa regluligar sendingar, eina til tvær um mánaðin.

**Eldfima gjaldið**

Tann fyrsti stutt-dokumentarurin varð gjørdur í februar mánaði við heitinum 'Eldfima gjaldið'. Tilfeingisgjaldið hevði í meira enn 10 ár verið eitt politiskt stríðsmál, og Løgtingið skuldi eftir ætlan taka støðu til, hvussu nógv fiskivinnan skuldi rinda í felagskassan við tilfeingisgjøldum. Men hvat er rætti prísurin? Og hvussu skal skipanin skrúvast saman? Tað viðgjørdi sendingin í 25 minuttir.

**FarsÓttin**

Annar stutt-dokumentarurin viðgjørdi tað aktuella evnið Covid-19. Tað var í mars mánaði. Óttin fyri ókenda virusinum í Fjareystri, sum kundi menna seg til eina alheims farsótt, gjørdi, at nøkur klók høvd í Føroyum av sínum eintingum brynjaðu føroyska samfelagið til at taka ímóti sóttini. Uppgávan eydnaðist, tí at vit valdu at halda fast og trúgva upp á egna vitan. 'FarsÓttin' var sjónvarpsdokumentarur við nýggjum og erligum frásøgnum frá fakligu høvuðspersónunum og frá sjúklingum. Vit vórðu leidd gjøgnum tíðina frá januar 2020, tá korona fór at gera um seg í Kina, til mars í 2021, tá koppsetingin bar boð um eitt frælsari lív. Sendingin var 45 minuttir long.

**Rustaðu milliónirnar**

Tann triði stutt-dokumentarurin kom í apríl mánaði og snúði seg um støðuna hjá Strandferðsluni. Hesin var nakað øðrvísi enn hinir báðir stutt-dokumentararnir. Hann var partur av Degi og viku og 15 minuttir til longdar. Vit lýstu støðuna á Strandferðsluni, sum stríðist við ov lítlari játtan til ein skipaflota, ið gerst alsamt eldri og harvið tyngjandi fyri raksturin. Aftan á innslagið kjakaðust Aksel V. Johannesen, formaður í Javnaðarflokkinum, og Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í samferðslumálum, um framtíðina hjá Strandferðsluni.

**Tað stóra satsið**

Tíðliga í 2021 varð støða tikin at gera sendingarnar, sum gjørdust 'Teir Ómettiligu' 1 og 2. Hetta var við stuðli úr ES-grunni og í samstarvi við fleiri útlendskar journalistar, serliga íslendskar. Hóast hjálp úr ES-grunni gjørdist hetta ein sera kostnaðarmikil sendirøð fyri Kringvarp Føroya, tí vit settu tveir journalistar á uppgávuna umframt fotograf og fríyrkisfólk. Mett varð, at evnið var so týdningarmikið, at vit kundu svara fyri tí, samstundis sum hetta gav okkum møguleika at sleppa upp í altjóða journalistisk samstørv, sum vit ikki høvdu roynt áður í sama mun. Tá sendingarnar um 'Teir Ómettiligu' vórðu gjørdar, komu vit upp í eitt stórt journalistiskt samstarv, PPLAAF, sum serliga viðger viðurskifti í Afrika. Tað vóru somu fólk, sum hildu fram í nýggja samstarvinum, og úrslitið varð sendingin 'Kongoránið'. Av tí at 'Teir Ómettiligu' og 'Kongoránið' kravdu so ómetaliga nógv av redaktiónini, so varð lítið gjørt við aðrar sendingar hetta tíðarskeiðið. Vit satsaðu upp á hesar stóru verkætlanirnar.

**'Teir Ómettiligu' 1 og 2**

Í 2016 varð skattalógin í Namibia broytt. Hendan lógarbroytingin hevði við sær, at allir útlendskir sjómenn, sum fiskaðu í namibiskum sjógvi, skuldu rinda skatt í Namibia. Men sambært Jóhannesi Stefansson, varskógvara og fyrrverandi stjóra hjá Samherja í Namibia, slapp Samherji sær undan hesari løggávuni við at nýta føroysk feløg at rinda hýrurnar hjá ávísum sjómonnum hjá Samherja í Namibia – og vóru hesir skrásettir sum manning á farmaskipum fyri at sleppa undan hesari løggávuni. Sendingarnar elvdu til nógva umrøðu, og íslendska felagið Samherji rindaði TAKS 17 mió. krónur, tí smápartafelagið Tindhólmur skal hava fingið pengarnar av óróttum í skattaafturbering fyri hýrur.

**Kongoránið**

Tá arbeitt varð við 'Teimum Ómettiligu', komu journalistarnir fram á skjøl, sum vóru upprunin til sendingina 'Kongoránið'. Áðrenn farið varð undir hetta arbeiðið, varð støða tikin til, at málið skuldi breiðast út á øllum pallum hjá Kringvarpinum, tað vil siga útvarpstíðindunum, Breddanum, Degi og viku og á heimasíðuni. Serliga vísti netið seg at vera serliga avgerandi, tí allir kringvarpsbrúkarar tann vegin kundu fáa eina enn neyvari vitan enn hana, sum varð løgd fram í dokumentarinum í sjónvarpinum.

Henda sendingin var heilt serlig fyri Kringvarpið, tí hon gav okkum atgongd til altjóða journalistiskt samstarv, PPLAAF, sum viðger viðurskifti í Afrika. Stórir altjóða miðlar sum BBC, Der Spiegel og

Bloomberg vóru við í samstarvinum. PPLAAF hevði saman við franska tíðindamiðlinum Mediapart og EIC skipað fyri kanningararbeiðinum, sum avdúkaði, at fyrrverandi forsetin í Kongo, Joseph Kabila, saman við vinum og skyldfólki hevði brúkt fólksins pengar at byggja sær sítt egna handilsveldi. Ein partur av pengunum fór eisini til Føroya, og illgruni var um hvíttvasking.

### Útvarp

Tíðindini í útvarpinum eru av alstórum týdningi fyri Kringvarp Føroya. Dagligu tíðindasendingarnar halda føroyingar dagførdar um, hvat hendir, men vit vilja eisini sleppa meira í dýpdina í útvarpinum. Í 2019 byrjaði sendingin Breddin, sum er mannaður við eini redaktión við trimum fólkum. Útvarpstíðindini og Breddin skulu síggjast sum ein eind, har fólk eisini ferðast ímillum og fáa ein meira fjølbroyttan arbeiðsdag.

Eftir ein tema-dag í Miðvági á Aktuelt varð umrøtt, hvussu vit fingu sum mest burtur úr Breddanum. Sendingin hevði verið ein tíma millum klokkan 17 og 18 tríggjar dagar um vikuna. Hetta gjørdi, at útvarpstíðindini klokkan 18 ikki fingu tað neyðuga burturúr, og at tilfarið var nakað gamalt dagin eftir. Tí varð semja um at flyta Breddan at vera klokkan 10 fýra dagar um vikuna, ein hálvan tíma hvørja ferð. Hetta skuldi gera, at tíðindini klokkan 12.20 fingu feskt tíðindatilfar frá Breddanum, og at tað eisini kundi koma til gagns klokkan 18. Skipanin varð sett í verk og hevur víst at virka eftir ætlan. Vegna sparingar varð Breddin nakað longri í summarferiu, enn hann átti, eisini tí at stóra dokumentarsatsið ávirkaði redaktiónа nógv. Vit valdu tó at halda fram, um enn redaktiónirnar vóru sera tunt mannaðar og sárbarar alla seinnu hálvu av 2021.

### Ítróttur

Ítróttaredaksjónin ger eina vikuliga ítróttasjónvarpssending, 3-2, mánakvøld kl. 19.30 og ítróttatíðindi til Dag og viku hóskvøld. Kappróður verður sendur beinleiðis í sjónvarpi og útvarpi og í útvarpssendingini "Bólturin" í sambandi við beinleiðis frásøgn frá bestu mansdeildini í fótbólti.

3-2 hevur lagt nakað um og stytt úr næstan einum tíma niður í ein hálvan tíma. Gestir eru ikki í sama mun í sjónvarpsstovuni. Orkan verður brúkt øðrvísi, tí tað eru nógvar nýggjar uppgávur lagdar á 3-2.

Ein av nýggju avbjóðingunum í ítróttinum er, at talið av beinleiðis sjónvarpsframleiðslum økist støðugt. Nógv hevur verið gjørt við landsliðsfótbólt, men avgerð er tikin um eisini at framleiða og senda landsdystir hjá kvinnum og monnum í hondbólti. Hetta gevur eitt økt arbeiðstrýst, men eisini nógvar spennandi uppgávur, sum okkara hyggjarar eru glaðir fyri.

### Sendingar tvørtur um pallar

Í 2020 gjørdu avbjóðingarnar við koronu, at vit gjørdu av at skipa politiskar kjakfundir øðrvísi enn vanligt. Tá vit skipaðu fyri kjakfundinum í sambandi við Heystfagnaðin, var tað uttan áskoðarar, og hugskotið við einum longum paneli við luttakarum varð slept. Í staðin varð skipað fyri einum fundi við bæði politikarum, bóndum og øðrum, sum høvdu sína meining um spurningin gongd í haga. Talan var um eitt kjak við javnari útskifting av luttakarum.

Tá vit komu til Torradagarnar í Klaksvík í 2021, og eingir áskoðarar kundu vera við til tiltakið, hildu vit fast við leistin frá Heystfagnaðinum. Vit vóru eitt sindur trilvandi, tí talan er um eitt heilt nýtt format, men vit hildu, at tað eydnaðist væl. Tá vit so aftur komu til Heystfagnaðin, valdu vit sama leist, hóast áskoðarar sluppu við til tiltakið. Vit høvdu aftur eina blogg-skipan, so hyggjarar kring landið eisini sluppu til orðanna.

Hetta tykist at vera leisturin frameftir. Vit ynskja at hava fleiri líknandi fundir kring landið, og vónandi fer tað at laga seg betur frameftir.



### Heimasíða og sosialir miðlar

Heimasíðan og sosialir miðlar eru eitt øki, sum skal mennast. Í 2021 varð redaktiónin mannað við einum fólki afturat – nú eru sostatt trý fólk, sum burturav arbeiða við netinum, og ein fotografur hálva tíð.

Ein størri verkætlan at menna heimasíðu og sosialu miðlarnar byrjaði eisini í 2020, men kom ikki á mál. Hetta arbeiðið var eisini darvað av koronu, men gongd varð sett á aftur í 2021. Tað strategiska arbeiðið er fyri ein stóran mun gjørt, og í dag sæst menningin meira í ítøkiligum broytingum, sum beinleiðis síggjast á heimasíðuni. At KT-deildin er vorðin ein nógv meira virkin leikari í menningini ger eisini stóran mun.

Heimasíðan og sosialu miðlarnir verða frameftir ein meira drívandi megi, tá framleiðslurnar skulu røkka brúkarunum.

# Mentan





# Mentan fyri øll

Hvørt ár framleiðir Kringvarpið fleiri røðir og stakar útvarps- og sjónvarpssendingar. Hesar verða bæði gjørdar av starvsfólkum í Kringvarpinum og fríyrkisfólkum. Talan er um eina fjølbroytta skrá við tilfari, ið lýsir og viðger føroyska samfelagið. Skráin hevur Public service-sáttmálan sum grundvøll.

Útvarpsskráin er drúgv, og sent verður alt samdøgrið. Í sjónvarpinum er framleiðslan meira avmarkað, men nógvar sendingar eru á skrá hvørja viku. Harafturat hava fleiri heilt stórar framleiðslur verið á skrá, nú fleiri av størru tiltøkunum í landinum hava verið avlýst. Tó hevur Kringvarpið eisini avlýst einstakar sendingar vegna koronu, t.d. bleiv væl umtókta nýggjárssendingin Syngið Við avlýst.

# Sjónvarp

**Dokumentar: «Ferðin inn í tað ókenda»**

Dokumentarurin 'Ferðin inn í tað ókenda' er gjørdur í sambandi við, at tað í fjør vóru 100 ár, síðani Ingálvur av Reyni var borin í heim.

Framleiðararnir av 'Svartur Sannleiki' (1999) hava 20 ár seinni verið í pappeskjunum og leitað gamlar upptøkur fram, sum máttu sáldast frá í klippingini til filmin. Virðismiklar upptøkur um ein av Føroya fremstu listamonnum, sum ikki hava verið vístar alment fyrr.

Dánjal Højgaard og Hans Petur Hansen gjørdu sendingina.

**Dokumentar: «Meira enn bara at vera til»**

Jóannes Madsen var dómari, violinleikari og kórsangari. Eitt óhapp eitt heystarkvøld í 2012 gjørdi enda á yrkisleiðini hjá honum. Hann hevur síðani stríðst fyri at endurvinna so nógv sum gjørligt av tí, hann hevur mist.

Dagmar Joensen-Næs og Jens Jákup Hansen gjørdu sendingina.

**Dokumentar: «7 dagar við Steintóru»**

Steintóra Erhardsdóttir er nýggjasti presturin í fólkakirkjuni. Hon varð prestvígd 11. apríl 2021 og skal avloysa í Suðurstreymoyar vestara prestagjaldi. Vit fylgdu henni í 7 dagar í juni, tá ið hon enn royndi at fóta sær í nýggja starvinum. Finnur Koba og Jónfinn Stenberg gjørdu sendingina.

**Dokumentar: «Eysturoyartunnilin»**

Eitt ár eftir at Eysturoyartunnilin læt upp, kom røðin 'Eysturoyartunnilin'. Frá byrjan til enda fylgdu vit arbeiðinum at gera tunnilin. Í trimum sendingum síggja vit, hvussu Eysturoyartunnilin bleiv gjørdur. P/F Eystur- og Sandoyartunlar hevur staðið fyri upptøkunum til sjónvarpsrøðina, og Kringvarp Føroya fekk loyvi at brúka upptøkurnar.

Hans Petur Hansen hevur tikið upp og sett saman, og Kári Sólstein hevur lagt sendingarnar til rættis.

**Náttúruvísindasendingar á føroyskum**

Fleiri náttúruvísindasendingar frá BBC vórðu týddar til føroyskt og sendar í sjónvarpinum í 2021.



Kringvarpið gjørdi avtalu um keyp av fleiri útlendskum sjónvarpssendingum um náttúruvísund í 2019, har 10 av hesum vóru liðugt týddar og sendar í 2021. Sendingarnar eru tøkar á netinum og verða dúgliga brúktar í føroyska skúlaverkinum.

Heini Reinert hevur týtt til føroyskt, Carsten Arnskov hevur sett saman, og Kári Sólstein hevur lagt til rættis.

**Størri framleiðslur**

Koronufarsóttin hevur havt við sær, at fleiri av afturvendandi tiltøkunum vórðu avlýst í 2021. Kringvarpið hevur tí í fleiri førum valt at samstarva við ymiskar stovnar og feløg og hevur sent eina alternativa útgávu av tiltakinum. M.a. varð tiltakið Geytin avlýst, men í samstarvi við Norðurlandahúsið gjørdi Kringvarpið eina sending í sjónvarpinum, har allir filmarnir vórðu vístir. Eisini FMA varð gjørt øðrvísi, har ein væleydnað sending varð gjørd uttan at verða send beinleiðis.

Í 2021 vóru tvær stórar innsavningar. Krabbameinsfelagið hevði eina innsavning í mars, og Kris/Sinnisbati høvdu eina í oktober.

Í tveimum umførum vórðu tónleikaupptøkur og prát til 'Í luftini gjørdar'. Í luftini er eitt samstarv við FMX (Faroese Music Export) og verður sent í sjónvarpinum hóskvøld, uml. eina ferð um mánaðin.

**Beinleiðis sjónvarp á nýggjárinum**

Í ár sendu vit beinleiðis nýggjárssending í sjónvarpinum nýggjársaftan við gestum í Sortudíki, innsløgum kring alt landið, løgmansrøðu, viðgerð av løgmansrøðuni, nýggjársheilsanum og sangi.

Umframt at senda beinleiðis var ein onnur høvuðsbroyting, at flestu innsløgini eisini vórðu gjørd nýggjársaftan. Á henda hátt fingu vit meira av fyrireikingum og nýggjárshuglagi inn í sjálva sendingina.

Gjøgnum dagin ferðaðust trý toymi kring landið, tóku upp og sendu tilfarið til Una Leitisstein Hansen, sum tók ímóti og setti saman. Hesi somu toymi vóru eisini úti til sjálva sendingina og gjørdu beinleiðis samrøður.

Klokkan 18.00 bjóðaðu vertirnir, Marin Eidesgaard og Uni Holm Johannesen, vælkomin, og klokkan 19.00 settu tey oman í Tinganes til nýggjársrøðu løgmans, sum í ár varð tvinnað saman við sjálva nýggjárssendingina. Tí beint eftir nýggjársrøðuna sat eitt trýmannatoymi í sjónvarpsstovuni klárt at viðgera tað, ið løgmaður hevði borið fram.

Sjálv sendingin endaði klokkan 20.20. Tá tók nýggjársrøðan og viðgerðin av henni ein hálvan tíma tilsamans.

Rólant Waag Dam samskipaði og var redaktørur, Bjarnheðin í Hoyvík framleiddi.



# Útvarp

Útvarpið er bygt upp við flatum, har sent verður fleiri tímar stórt sæð dagliga og við einstøkum sendingum og røðum. Gerandisdagarnir hava rútmu, har dagarnir líkjast, meðan vikuskiftini hava eina aðra skrá.

**Góðan morgun Føroyar**

Hvønn gerandismorgun er Góðan morgun Føroyar á skránni frá klokkan 7.35 til 9.50. Hóast samfelagið framhaldandi var niðri í ferð partar av 2021, hevur morgunsendingin sent sum vant.

Evnisliga hevur sendingin stóra breidd, og málbólkurin er breiður. Alt frá fuglatátti, serfrøðingum, veðurforsøgnum, kappingum og søgum kring landið. Eisini hevur sendingin í størri mun sent video beinleiðis á netinum, og hevur hetta verið sera væl umtókt við nógvum hyggjarum.

Á sætta sinni leitaði morgunsendingin eftir ársins orði. Hetta var sum vant gjørt saman við lurtarum og Málráðnum. Tá avtornaði, var orðið "sammóðir" kosið ársins orð í 2021.

**NÓN**

Nón er seinnapartssendingin í útvarpinum við denti á mentan og samfelag. Nón leggur seg eftir at viðgera mentan í breiðari merking, og lyklaorð fyri sendingina eru grundan og umhugsni.

Málið er at geva lurtaranum upplýsing, uppliving og undirhald gjøgnum beinleiðis útvarp, kryddað við reportasjum, frásagnum og kjaki, har stundir eru til longri samrøður, viðgerðir og greiningar.

Nón bleiv nakað skerd í 2021, og senditíðin fór niður í tríggjar tímar um vikuna, mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 15-16.

Mentanin hevur eisini verið hart rakt av farsóttini í 2021, og tiltøk og konsertir hava verið avlýst. Nón hevur kortini hildið fast við at seta mentanina ovast og støðugt umrøða mentanarlig tiltøk, rák og rembingar, og hava samrøður við fólk, sum fáast við mentan.

## Røðir og stakar sendingar

Umframt størru flatarnar eru ein rúgva av røðum og støkum sendingum á skránni. Tær føstu og væl kendu sendingarnar eru m.a. Við Tórði á túri, Brunsj, Vikuskifti, Meg Minnist, Kvørnin, Credo og Málteigurin. Harafturat hava fleiri styttri og longri røðir verið á skránni í 2021.

**Minnismyndir**

Eitt nýtt umfar í røðini Minnismyndir var á skránni á heysti 2021. Í sendingunum siga fólk frá ymiskum hendingum, teimum hevur verið fyri í barna- og unglingaárum, tá ið Føroyar vóru annað oyggjasamfelag, enn tær eru í dag. Fleiri av gerandishendingunum, sum sagt verður frá, fóru fram fyri nærum 100 árum síðani, og nógv bæði øðrvísi og hugtakandi er at hoyra um.

Marianna Debes Dahl legði til rættis.

**Málbroytingar í føroyskum**

Summarið 2021 sendi útvarpið eina sendirøð undir heitinum 'Málbroytingar í føroyskum'. Talan var um seks sendingar, sum vóru um hálvan tíma til longdar hvør. Tær snúðu seg um málbroytingar í nútíðarføroyskum, har Hjalmar P. Petersen, professari í málvísindum á Fróðskaparsetrinum, greiddi frá broytingunum og grundum teirra. Evnini í sendingunum vóru millum annað málamót, lánorð, bendingarskipanin, orðmyndan, kyn og possessiv. Tosað verður um, hvussu nútíðarføroyskt er broytt og broytist, og hvørjum broytingarnar koma av. Sendingarnar vóru á skránni týsdagar frá 20/7 til 24/8 í 2021.

Gestur: Hjalmar P. Petersen, lagt til rættis: Solby Christiansdóttir



**Einabúgvin av Viðareiði**

86 ára gamli Mikkjal Sørensen av Viðareiði hevur í samfull 56 ár búð einsamallur í oynni Kingitoq í Suðurgrønlandi. Vit vitja Mikkjal, sum framvegis rør út og hevur seyð.

Mikkjal Lodmund Sørensen, sum hansara fulla navn er, fór til Grønlands á vári í 1963 at rógva út, og hann hevur ongantíð verið aftur í Føroyum. Sjálvt um hann er einabarn, og pápin doyði av vanlukku, meðan Mikkjal var stórur smádrongur, og mamman livdi einsamøll á Viðareiði til ellisár.

Mikkjal býr mitt í náttúruni í Suðurgrønlandi, og hann er ein gløggur eygleiðari. Hann hevur øll hesi árini verið útróðrarmaður og havt seyð, og hóast meginparturin av seyðinum nú er tikin av, ganga nakrir eftir. Hann tímir illa at tosa um seg sjálvan, men tosar hugaliga um tær stóru linjurnar í náttúruni, m.a. veðurlagsbroytingina, sum hann sjálvur hevur upplivað og hugagóður greiðir frá.

Tórður Mikkelsen legði til rættis.

**Fýra føroysk systkin í Sacramento**

Á jólum sendi Kringvarpið eina dokumentariska ljóðmynd í tveimum pørtum við felagsheitinum “Fýra føroysk systkin í Sacramento”.

Vit hoyra m.a. um 21 ára gamla Nickels Joensen, sum í 1879 skrivaði seg inn til herflotamann í Boston í USA. Hann var úr Havn og varð lagdur inn á hernaðarsjúkrahús í Kalifornia. Har búði hann í 25 ár. Seinni flyta eisini tilkomnu systrarnar hjá Nickels – allar seymikonur í Havn – av Eystaruvág í Havn yvir til beiggjan Nickels á amerikonsku vesturstrondini.

Burtur úr skjølum, bløðum og brøvum fáa vit eina fatan av longu ferðini úr Føroyum til Kalifornia, hvussu systkini kláraðu seg, samskiftið tey høvdu við beiggjan Hans Joensen í Havn, og hvussu gekst teimum øllum.

Lagt til rættis: Magni Arge

**Frá fyrsta Smirli til í dag – føroysk samferðslusøga í 125 ár**

Føroyska samferðslukervið hevur havt og hevur alstóran týdning fyri menningina av føroyska samfelagnum, bæði vinnuliga, mentanarliga og við atliti at, hvar ið vit búseta okkum.



Startskotið til nýmótans samferðslukervið er fyrsti Smiril, ið kemur til landið í desember 1895, og endamálið við sendirøðini er at lýsa og viðgera føroysku innanoyggja samferðslusøguna, tað veri seg tá ið talan er um rutu- og postbátar, ferjur, akfør, vegir, brýr, byrgingar, tunlar og loftvegis flutningssamband frá fyrsta Smirli til í dag, samstundis sum tað eisini verður nomið við, hvønn týdning allar hesar samferðsluútbyggingar hava havt.

Keldurnar í sendirøðini eru í stóran mun bøkur, føroysku bløðini, útvarps- og sjónvarpssavnið í Kringvarpinum, umframt samrøður við serfrøðingar og fólk, ið, sum starvsfólk og/ella fólk á staðnum, kunnu leggja ein bæði fakligan og persónligan vinkul aftur at teimum ymisku hendingunum.

Bygnaðurin ella tónin í sendirøðini er lættur og fólksligur og telur nýggjar samrøður, brot úr søgusavni Kringvarpsins, upplestur og faktaboksir.

Gunnar Nolsøe legði til rættis.

# Ítróttur



# Ítróttaframleiðslur í 2021

**Februar**

| | |
|---|---|
| Hondbóltur | VÍF-StÍF, kvinnur |
| Hondbóltur | KÍF-Neistin, menn |
| Hondbóltur | VÍF-Neistin, menn |
| Hondbóltur | Neistin-Kyndil, kvinnur |
| Ítróttafagnaðurin hjá ÍSF | |
| Steypafinalurnar í hondbólti | H71-Neistin x 2 |
| Steypafinalurnar í flogbólti | Dáttur-SÍ og ÍF-Mjølnir |

**Mars**

| | |
|---|---|
| Hondbóltur | KÍF-Team Klaksvík |
| Hondbóltur | FO-Ukraina, menn |
| Hondbóltur | VÍF-Team Klaksvík, menn |
| Fótbóltur | Moldova-FO, menn |

**Apríl**

| | |
|---|---|
| Hondbóltur | VÍF-Neistin, menn |

**Mai**

| | |
|---|---|
| Hondbóltur | FO-Kekkia, menn |
| Estetiskurfimleikur | FM |
| Hondbóltur | FO-Ísrael, kvinnur |

**Juni**

| | |
|---|---|
| Fótbóltur | FO-Íslands, menn |
| Fótbóltur | FO-Liktinstein |
| Kapproður | Sundalagsstevna |
| Kapproður | Jóansøka |

**Juli**

| | |
|---|---|
| Kapproður | Varmakelda |
| Kapproður | Fjarðastevna |
| Kapproður | Vestanstevna |
| Kapproður | Norðoyastevna |
| Kapproður | Ólavsøka |

**September**

| | |
|---|---|
| Fótbóltur | FO-Ísrael, menn |
| Fótbóltur | FO-Danmark, menn |
| Fótbóltur | FO-Moldova, menn |

**Oktober**

| | |
|---|---|
| Fótbóltur | FO-Eysturríki, menn |
| Fótbóltur | FO-Skotland, menn |
| Hondbóltur | FO-DK, kvinnur |

**November**

| | |
|---|---|
| Svimjing | FM á stuttgeil |

**Desember**

| | |
|---|---|
| Fótbóltur | Steypaf. B36-NSÍ, menn |

**Dystir úti**

| | |
|---|---|
| Hondbóltur | Kekkia-Føroyar, menn |
| Hondbóltur | Ukraina-Føroyar, menn |
| Hondbóltur | Hvítarussland-FO, kvinur |
| Hondbóltureis-FO, kvinnur | |
| Fótbóltur | Moldova, FO, menn |
| Fótbóltur | Eysturríki-FO, menn |
| Fótbóltur | Skotland-FO, menn |
| Hondbóltur | Russland-FO, menn |
| OL-rógvingerri í Tokyo | |
| PL-renning | Hávard í Tokyo |
| Hondbóltur | Rumenia-FO, kvinnur |
| Fótbóltur | Danmark-FO, menn |
| Fótbóltur | Ísrael-FO, menn |

**3-2**

43 sendingar í 2021

# Savnsgull



# SAVNS GULL

## Talgylta savnsgullið

SavnsGull er verkætlan, ið arbeiðir fyri, at alt kringvarpssavnið verður talgildað, og at savnið gerst atkomuligt fyri almenningin. Í 2014 varð verkætlanin sjósett, og arbeiðið er ásett at gerast liðugt í 2024.

Í kringvarpssavninum er nógv av tí tilfarinum, sum er framleitt í Føroyum síðani 1957, tá Útvarp Føroya varð sett á stovn. Okkara felags søga frá 1984, tá Sjónvarp Føroya varð stovnað, til í dag er eisini varðveitt á livandi myndum.

Arbeiðið at talgilda kringvarpssavnið gongur framá. Av 520.000 pappírsskjølum eru um 75.000 eftir at skráseta. Talgildingin av útvarpsbondunum átti at verið liðug, men tað eru um 2.000 bond eftir at talgilda. Tá ið arbeiðið at talgilda fyri Føroyamálsdeildina er liðugt, eru oman fyri 30.000 metalbond talgildað.

Eftir at A.P. Møller Fonden stuðlaði verkætlanini við 5 milliónum, hevur gingið skjótt at talgilda sjónvarpspartin. Í 2021 varð seinasta bandið talgildað, men tá komu fleiri bond undan kavi. Tey bondini verða í løtuni talgildað í Belgia.

Arbeiðið at gera SavnsGull sjónligt og savnið atkomuligt steðgaði upp. Korona gjørdi sítt, og aðrar umstøður hava eisini gjørt tað trupult at halda fram við tí partinum av verkætlanini.

Tað komu óvæntaðar avbjóðingar í 2021. Serjáttanin til verkætlanina upp á 900.000 kr. bleiv tikin av fíggjarlógini. Í staðin skuldi Kringvarpið hava eitt yvirskot upp á 900.000 kr, ið skuldi fíggja verkætlanina. Undanfarnu ár hevur Kringvarpið havt útreiðslur av verkætlanini upp á umleið 500.000 kr. Avleiðingarnar av hesum hava verið, at tað bert hava verið fimm starvsfólk í SavnsGulli í 2021. Undanfarnu ár hava verið 8-10 starvsfólk. Uttan ta góðu skipanina við fólki úr skipanini hjá Almannaverkinum var SavnsGull ikki komin langt á leiðini í 2021.

# Átrúnaður



# Trúarlívið



**Hetta heilaga evangeliið skrivar**
Sendingin verður send hvørt leygarkvøld kl. 17:45 og endursend sunnumorgun kl. 8:45.

Tað eru ymiskir prestar, sum skriva til eitt kirkjuár í senn. Eitt kirkjuár byrjar og endar fyrsta sunnudag í advent.

Í ár er tað Gerhard Jónsson Mikkelsen, prestur, sum skrivar og lesur.

**Morgunlestur**
Ymiskir prestar hava skrivað morgunlestur, og teir og leikfólk lesa.

**Sálmar**
Nýggja og gamla sálmasavnið er talgilt og lagt út á heimasíðuna hjá Kringvarpinum.

Vit hava í fleiri ár ferðast kring landið og tikið upp sálmasang, tí okkum vantar nýggjar upptøkur. Eisini er Sálmabókaískoytið komið, og har eru fleiri sálmar, sum vit ikki hava í savninum enn.

Tá vit senda gudstænastur frá stórum kirkjum, tá hátíðir eru, taka vit sálmarnar serstakt upp, so teir kunnu fara í savnið.

Vit eru ikki komin á mál við ætlanini um at hava allar teir nýggju sálmarnar í okkara savni.

**Møti í útvarpinum**
Seks ferðir um árið senda vit evangeliskt møti hjá Brøðrasamkomuni. Vanliga verða tey send sunnudag kl. 17:00. Vit fáa tey sum lidna framleiðslu at senda.

**Ferðaliðið**
Hetta er toymið, sum tekur møti og guðstænastur upp hvønn sunnudag, sum verða send í sjónvarpinum.

Síðani koronudagarnar hava vit hvønn sunnumorgun tekstað alla guðstænastuna og ofta eisini prædikuna hjá presti.

Vit teksta sang/sálmar hjá fríkirkjunum.





**Guðstænastur í útvarpinum**

Vit royna at senda guðstænastur kring alt landið, har tað ber til.

Í útvarpinum og sjónvarpinum senda vit somu guðstænastu beinleiðis.

Allahalganaraftan sendu vit guðstænastu úr Dómkirkjuni beinleiðis í útvarpinum.

**Guðstænastur og møti í sjónvarpinum**

Vegna koronu hava ongar uttanduraguðstænastur, dansibandsguðstænasta ella guðstænastan úti við Gjógv verið.

Nýggjársaftan og nýggjársdag sendu vit guðstænastu, sum vit tóku upp í Vestmanna kirkju í november. Maria Summers Nolsøe, prestur, prædikaði. Pauli Magnussen og Róin Siggertsson spældu og sungu "Ró" hjá Martini Joensen. Magni Christiansen og tvey kór sungu eisini.

Guðstænastur og møti annars verða send ymsastaðni frá í landinum.

Møtini og guðstænastur eru úr Katólsku Mariukirkjuni, Hvítusunnusamkomuni, Kelduni, Oasuni, Adventistakirkjuni, Kirkjuligu Heimamissiónsfelagnum, Brøðrasamkomuni, Frelsunarherinum og Heimamissiónini.

Drotningavitjan var 18. juli, og vit sendu guðstænastu úr Fríðrikskirkjuni.

**Andaktir í sjónvarpinum**

Andakt er hvørt sunnukvøld kl. 19:50. Andaktin verður einans flutt av serligum ávum. Tað eru ymsar samkomur og kirkjur, sum skriva og lesa hesar andaktir.

Á mishalgidøgum/hátíðum eru tað prestar í Fólkakirkjuni, sum skriva og lesa. Hesar andaktir verða tiknar upp í ymsum kirkjum.

**Credo**

Credo er hvønn sunnudag kl. 10:05, har ljós verður varpað á átrúnað og onnur menniskjanslig viðurskifti og rák.

Sannast má, at persónliga søgan hjá einstaka føroyinginum hevur stóran lurtaraskara.

**Annað**

Kári Sólstein og Armgarð Arge vórðu boðin til fundar hjá Kristiliga lurtara- og hyggjarafelagnum. Tey vórðu spurd, um tey kundu greiða frá átrúnaðarliga partinum í Kringvarpinum.

Eisini hava Kári Sólstein og Armgarð Arge verið á "prestafundi" á Hotel Føroyum at greiða frá ymsum átrúnaðarligum í Kringvarpinum. Kári vísti á ymisk lurtara- og hyggjaratøl, og Armgarð Arge segði frá, hvussu tað átrúnaðarliga økið er skipað.

Á jólum 2021 las Eydna Skaale jólatekstir í Havnar kirkju. Tórfríð Tavsen sang, og Dánjal Tavsen spældi klaver.



# Ungdómur



# Gentuvesið vísir vegin

Ungdómstoymið Biit hevur av álvara fingið fótin fyri seg, nú tey eru vorðin eitt ára gomul. Serliga er tað Gentuvesið, sum hevur víst vegin. Gentuvesið byrjaði sum poddvarp á biit.fo, men gjørdist partur av summarskránni í útvarpinum í fjør. Tá fekk Gentuvesið veruliga luft undir veingirnar, og Biit merkti øktan áhuga fyri tilfarinum, tey framleiða.

Gentuvesið hevur verið fastur partur av skránni síðani í fjør summar. Biit framleiddi upprunaliga til netið burturav, men við Gentuvesinum er henda meginregla broytt – og tað er gott, tí staðfestast kann, at tilfarið røkkur munandi longri út, tá tað eisini verður sent í útvarpinum.

Tí er annað tilfar frá Biit eisini sent í útvarpinum. Ummælarapoddvarpið Biit & Chill var at hoyra í nakrar vikur, teir tríggir partarnir av røðini PolEtikk eru eisini sendir í útvarpinum, umframt at tónleika- og mentanarsendingin Repopplikkin nú er at hoyra hvørja viku í útvarpinum.

Biit hevur seinasta árið eisini sent beinleiðis útvarp frá Voxbotni. Tey hava framleitt nakað av videotilfari frá tónleikakappingini Sement, og tilfar kemur regluliga úr Danmark til vloggin ‘Bjørg á slottinum’, sum snýr seg um Bjørg, ið gongur á eftirskúla í Danmark.

Higartil hevur Biit framleitt 23 ymiskar røðir. Eitt nú eru 40 partar av Gentuvesinum gjørdir og sendir, og á Spotify hevur Gentuvesið oman fyri 23.000 streams. 16 partar eru gjørdir av Repopplikkini og níggju partar av Biit & Chill, har tey eitt nú hava ummælt filmin Skál og røðina Trom.

Nýggjasta røðin hjá Biit er poddvarpið ‘Vegurin aftur til veruleikan’, sum snýr seg um Vilhelm og kronisku sjúku hansara. Í næstum kemur ein animerað stuttsøga og ein videoframleiðsla um noise-tónleik í Føroyum.

Umleið 15 ung fólk eru knýtt at Biit. Rólant Waag Dam er verkætlanarleiðari og redaktørur.

# Børn



# Tey smáu oyruni og eyguni












### Evnisvikur í barnaútvarpinum

Í barnaútvarpinum løgdu vit okkum eftir at gera fleiri evnisvikur, har vit fóru í dýpdina við ymiskum evnum, sum allir føroyingar kunnu kenna seg aftur í. Vit løgdu fyri við evninum um rottur – rottur sum skaðadjór, søguliga og samfelagsliga. Vit hoyrdu um djóraslagið, og hvat eitt nú rottufangarin ger, tá ið hann verður boðsendur. Fleiri evnisvikur snúði seg um náttúru. Í februar mánaði varð varpað ljós á vár, veður og vøkstur. Vit fingu eina rúgvu at vita um trø, veðurlag og um hvat veksur og spírar. Fuglar eru sera áhugaverdir, og her greiddi lívfrøðingur frá fugli sum djóraslag. Vit vitjaðu, har tjaldur pikkaði á dyrnar hvønn morgun og hoyrdu um, hvussu Fuglafrøðifelagið skipar fyri fuglabingo. Seinastu tíðina hava vit hoyrt nógv um undirsjóvartunlar. Og vit kendu okkum hepnar at sleppa við, tá ið sprongt varð í Sandoyartunlinum. Her var nógv spennandi at hoyra frá jarðfrøðingi og øðrum, sum gera stóra fyrireikingararbeiðið, tá ið ein nýggjur tunnil skal gerast. 8. mars var mánadagur, og ta vikuna vórðu kvinnur settar á skrá – ein evnisvika um kvinnur í politikki, list og ítrótti.

### Fjølbroyttar bókmentir

Tá ið vit velja bókmentir, leggja vit okkum eftir, at tær fjølbroyttu sjangrurnar verða umboðaðar. Her var nógv spennandi at hoyra. Vit byrjaðu við framhaldssøguni 'Tje', sum Bókadeild Føroya lærafelags gav út í 2020. Ein dagin fær Tje at vita, at hann og foreldrini skulu flyta til býin, og tað dámar honum onki. 'Fílasteinurin' er eisini ein spennandi bók, sum snýr seg um Babit, sum býr í Thyborøn og líkist ikki hinum. Tað er bæð tí, at hann etur nokk so nógv Nutella, og tí mamma hansara er úr Tailandi. 'Varaprinsessa Andersen' var onnur framhaldssøga í barnaútvarpinum í 2021. Summi børn eru friðarlig, og teimum dámar ikki at tosa hart, at standa á einum palli, ella tá øll hyggja at teimum. Soleiðis er Lisa Andersen. Hon stúrir fyri síðsta skúladegi og sjónleikinum, sum flokkurin skal framføra. Eisini var framhaldssøgan 'Dóttir skammarans' at hoyra. At hoyra uppruna føroyskar bøkur er sera týdningarmikið, tí tá kann lurtarin veruliga kenna seg aftur í søguni. Vit valdu at lesa bøkurnar '112 Fuglafjørður', sum Elin á Rógvi hevur skrivað, sum er sera stuttlig. Bókin snýr seg um hanan Morgunfríða, sum dugir at tosa, og abban, sum fær stórar trupulleikar av tí prátingarsama hananum, sum altíð sigur "og mamma". 'Marin fær ein lítlabeiggja' er onnur bók, sum eisini var at hoyra í barnaútvarpinum. Ingun Kristensen hevur skrivað um, hvussu tað kennist at fáa ein lítlabeiggja. Sólgerð Andreassen hevur skrivað bókina 'Tjaldrið í Hoyvík', sum hóskaði væl til várið.

### Útvarpsleikir og ljóðmyndir

At hjúkla um hoyrisansin og at hava livandi myndir í huganum er sera týdningarmikið. Útvarpsleikir og ljóðmyndir skulu avgjørt mynda sendiskránna. 2021 var onki undantak. Vit hoyrdu Sirkusgátuna og um Kristoffur Kolumbus. Serstakliga vórðu bøkurnar 'Handbók fyri superhetjur' sera væl móttiknar. Tær eru spennandi og viðkomandi, og borðreitt er við góðum upplestri og góðari ljóðmynd. 'Tey í Mórugøtu 8' hoyra heima í barnaútvarpinum. Jákup Veyhe borðreiddi við frálíkum útvarpsleiki í november, og sum altíð var lurtarin væl nøgdur. Í desember mánaði endursendu vit spennandi jólakalendaraleikin 'NiviNaja', sum Elin á Rógvi hevur skrivað. Sendingarnar vórðu væl vitjaðar á kvf/vit.fo, serstakliga, tá ið NiviNaja var á skrá í desember.

### At ferðast kring landið

Tað var sera spennandi at ferðast kring landið og hoyra børn greiða frá teirra søgum. Vit sendu eina viku úr Klaksvík, eina viku úr Sandoynni og eina viku úr Suðuroynni. Stuttligt at hoyra børn greiða frá og framúr áhugavert at hoyra, hvussu tey uppliva gerandisdagin við frítíðarítrivi og áhugamálum. Eisini fingu vit fleiri brøv til sendingina 'Lova mær við'. Tá hoyrdu vit eisini søgur ymsastaðni úr landinum. Onkur hevði fingið ein lítlabeiggja, onnur høvdu bygt smáttu við kiosk, og onnur vóru umborð á sluppini Westward Ho.







**Tónleikur og sangur**

Tónleikur og sangur er stórur partur av føroysku mentanini. Tað var ein sonn frøi at hoyra børn úr ymsum skúlum syngja, spæla ljóðføri og greiða frá. Tað er eisni sera áhugavert at hoyra søgur um sangir, sum vit øll kenna. Vit hoyrdu eitt nú um Mikkjal á Ryggi og um sangin ‘Gakk tú tryggur’, sum flest øll duga at syngja.

Fleiri stakar sendingar vórðu gjørdar, sum fylgja árstíðini. Eitt nú um páskir, listameldur, føroyskan dans, sosiala íverksetan og um móðurmálsdagin. Eisini vóru vit til ymisk tiltøk, sum børn vóru partur av.

**Sakin**

Í barnasjónvarpinum varð største dentur lagdur á sendingina ‘Sakin’. Sakin er sera væl umtókt og borðreiðir við nógvum spennandi, stuttligum og øðrvísi evnum. Her er nógv gjørt burtur úr grafikki, tí myndaliga og tí skemtingarsama. Við degnum í dag fáa vit nýggja vitan, borðreidda við góðum grafikki. Petursa borð er eisini fjølbroytt við tónleiki, skemtisøgum og áhugaverdum evnum. Innsløgini vóru sera ymisk, og børn kring landið sluppu til orðanna at vísa síni kynstur ella greiða frá hugtakandi søgum. Vit fylgdu steypakappingini í hondbólti og flogbólti. Vit vóru við til kappingina í bogaskjóting og vóru við og sóu, hvussu tað er eitt nú at vera judoleikari, og hvussu tað er at klintra úti. Eisini fylgdu vit árstíðini og tiltøk, sum børn eru partur av. Hvørt fríggjakvøld í vetrarskránni var Sakin á skrá.

**Mouk og Snipp Snapp**

Teknirøðin ‘Mouk’ varð framleidd til vetrarskránna. Mouk og Chavapa ferðast kring heimin á súkklu. Teir vitja ymisk lond, teir møta áhugaverdum fólki og læra ymiskar mentanir at kenna. Í sendingini Snipp Snapp var Mouk at síggja. Her framleiddu vit fleiri sendingar við børnum, sum eru vertir og siga, hvørjir teknifilmar eru á skránni. Eitt nú vóru vit á Gøtusandi og filmaðu barnavertir.

**Stjørnudust**

Jólakalendarin Stjørnudust fekk sera góða móttøku. Stjørnudust er eitt nútímans ævintýr um at halda jól fyri fyrstu ferð eftir ein hjúnaskilnað, um at uppliva broytingar í lívinum og at fáa sær nýggj vinaløg. Dronguin Jo flytur í ein annan bý at búgva, eftir at foreldrini eru skild. Jo dámar einki av hesum nýggja og vil bara, at alt skal vera, sum tað var. Pápi hansara er stjørnugranskari, og saman hyggja teir ofta at stjørnuhimmalinum. Pápin, Steinar, sigur, at tá ið teir sakna hvønn annan, kunnu teir hyggja at Norðstjørnuni, tí hon er leiðarastjørnan yvir allar stjørnur. Tá alt gongur galið í nýggja býnum, finnur Jo Norðstjørnuna, men so hendir tað ótrúliga: Hon sløknar! Síðani hitti Jo eina gentu, ið kallast Elly, sum er ein av stjørnufólkunum. Ferðslan á heimasíðuni var sera góð í desember, og hvør partur av Stjørnudusti fekk á leið 5.000 klikk.

# Tónleikur



# Føroyskir tónar fyrst og fremst

Føroyskur tónleikur hevur fremstu raðfesting á tónleikaøkinum í Kringvarpinum.

Tað hevur alstóran týdning fyri føroyskan tónleik, at hann verður hoyrdur kring landið, og tí fær føroyskur tónleikur stórt rúm í útvarpinum. Í 2021 var meir enn helvtin av tónleikinum í útvarpinum av føroyskum uppruna.

Tónleikaráðið í Kringvarpinum avger, hvørjir nýggir sangir verða settir í umferð í útvarpinum. Á vikuligum fundum verður nýggjur tónleikur spældur, viðgjørdur og vigaður, áðrenn hann verður settur í umferð. Uppskotini koma frá tónleikarum, plátufeløgum, lurtarum hjá útvarpinum, limunum í tónleikaráðnum og starvsfólkum hjá Kringvarpinum.

Tónleikaráðið er samansett av starvsfólkum, sum fáast við og spæla nýggjan tónleik í sendingum. Í 2021 vóru limirnir Rannvá G. Fossaberg, Kári Sólstein, Elin Michelsen, Rúni Jákupsson og Eyðfinn Jensen, tónleikasamskipari.

Spæl føroyskt-vika var frá 1. til og við 7. mars, og tá var einans føroyskur tónleikur spældur í øllum frumsendingum, á náttarrásini og rundan um sendingar annars í útvarpinum.

Ársins útvarpshitt varð kosið í 2021 á triðja sinni. Talan var um eina atkvøðugreiðslu, ið gekk fyri seg á heimasíðuni hjá Kringvarpinum í Spæl føroysktvikuni.

Lurtararnir hjá Kringvarpinum valdu sangin “Lítli fuglur” við Lív Næs og Tróndi Enni til at vera Ársins útvarpshitt í farna árinum 2020.

Faroese Music Awards 2021 varð, vegna koronu, avlýst sum tiltak við áhoyrarum í Norðurlandahúsinum, men bleiv í staðin framleitt sum ein sending í sjónvarpinum.

Alment útboð var á sumri í 2021 av tónleikasendingunum Mono, Jazzofonin, Óhoyrt og Jambalaja.

Harumframt vóru eisini aðrar stakar tónleikasendingar í sambandi við høgtíðir og merkisdagar.

Sjónvarpið sendi javnan nýggj og eldri videoløg sum millumsendingar.

Tónleikasamskipari: Eyðfinn Jensen






Vikuligu tónleikasendingarnar í útvarpinum eru smalar, men okkurt er fyri øll – poppur, klassiskur tónleikur, jazz, andaligur tónleikur, tónleikaummæli, nýggjur og gamal tónleikur, kvæði, rokkur, dansibandstónleikur o.m.a.

### Ein rúgva av konsertupptøkum sendar í sjónvarpinum

Ein rúgva av konsertupptøkum vórðu sendar í sjónvarpinum í 2021, m.a. nýggjárskonsertin 2021 við Føroya Symfoni Orkestri, útgávukonsert hjá Teiti, TeenStreet lovsangur í fimm pørtum, Faroese Music Awards (FMA) og 10 ymiskar ‘Í luftini’-konsertir.



# Public Service

# Í fólksins tænastu

**Samskifti við borgaran**

Kringvarpið leggur seg eftir at skipa fyri upplýsing um public service og fólkaræði í breiðum týdningi.

Nýggj síða, Um KVF, er gjørd á heimasíðuni, har fesk tíðindi og blogginnlegg um stovnin, public service og programmvirksemi verða kunngjørd.

Góður møguleiki er fyri samskifti um alnet og heimasíðu stovnsins. Millum annað er møguligt at senda rís og rós á kvf.fo og at skriva til vangan hjá Kringvarpinum á Facebook, so tað ber til at siga sína hugsan um tíðindaflutning og programmvirksemi í Kringvarpinum.

**Alnetstænastur og sosialir miðlar**

Eitt av málunum hjá Kringvarpinum er at røkka føroyingin, har hann er. Sosialir miðlar eru komnir fyri at verða, og føroyingar nýta nógva tíð á hesum miðlunum. Kringvarpið hevur í fleiri ár verið til staðar á sosialu miðlunum við tilfari, sum vísir til og skapar áhuga fyri sendingum á netinum, í útvarpinum og í sjónvarpinum. Kringvarpið virðir leiðreglurnar um góðan fjølmiðlasið á sosialu miðlunum á sama hátt sum á hinum miðlapallunum.

Heimasíðan hjá Kringvarpinum verður støðugt ment sum samskiftis- og tænastumiðil, soleiðis at hon kennist viðkomandi og týdningarmikil fyri føroyingar í øllum aldri. Heimasíðan fevnir um tíðindi og aktuelt, mentan, tilfar til børn og ung, undirvísing og annað viðkomandi.

Kringvarpið samskipar talgilt føroyskt tilfar til børn og ung, so at tað verður lætt atkomuligt.

**Føroyskt mál í Kringvarpi Føroya**

Kringvarpið er tilvitað um ábyrgdina og týdningin, ið stovnurin hevur fyri føroyska málið. Stremban okkara er, at allar sendingar, ið vit framleiða, eru á góðum, føroyskum máli. Fyri at lúka hesar ásetingar varð skipað fyri rættstavingar- og málskeiði bæði á vári og á heysti í 2021 fyri starvsfólki í Kringvarpinum. Anfinnur Johansen, Zakaris Svabo Hansen og Lena Reinert undirvístu.



**Public service-skyldur hjá Kringvarpi Føroya**

Kringvarp Føroya hevur skyldu til at útvarpa sendingar, ið fevna um tíðindi, upplýsing, mentan og undirhald. Kringvarp Føroya skal í programmvirkseminum leggja dent á upplýsingar- og talufrælsi, sakliga og óhefta upplýsing og eitt fjøltáttað tilboð, sum varðveitir og fjálgar um mál, mentan, átrúnað og siðalæru føroyinga.

– úr kringvarpslógini

Eisini kann nevnast, at málsligar vendingar verða umrøddar vikuliga á intraneti okkara.

Umframt hetta er málsendingin "Málteigurin" á skránni hvørja viku, har málserfrøðingur greiðir frá, og lurtararnir hava høvi at seta spurningar.

**Týtt, útlendskt tilfar**

Av tí at fíggjarlig orka ikki hevur verið til at týða alt útlendskt tilfar til føroyskt og orsakað av rættindaspurningum, hevur Kringvarpið lagt seg eftir at týða so nógv barnatilfar sum gjørligt. Tað er umráðandi, at føroysk børn hava atgongd til útlendskar teknifilmar, sum eru týddir til móðurmálið, eitt nú "Grísa Peppa" og "Alt um djór".

Kringvarpið týðir eisini sendingar til vaksin, tó hevur tað í størstan mun verið talan um føroyskan tekst og ikki føroyska talu.

**Tænastur til fólk, ið bera brek**

Í 2021 vórðu Dagur og vika og allir tíðindafundir deyvatulkað. Eisini verður dokumentarurin hóskvøld tekstaður.

**Sendingar úti um landið**

Kringvarp Føroya er fyri allar føroyingar, og tí er týdningarmikið, at stovnurin framleiðir tilfar úr øllum landinum. Við Tórði á túri er vikulig sending, sum vitjar øll økini í landinum og greiðir frá gerandisdegnum á bygd og í býi. Harafturat eru nógvar av sendingunum hjá Kringvarpinum regluliga kring landið. Eitt nú kunnu vit nevna útvarps- og sjónvarpstíðindini, Góðan Morgun Føroyar og seinnapartssendingina Nón, sum hevur útvarpað frá fleiri av mentanarvikunum í landinum.

**Keyptar framleiðslur**

Fríyrkisfólk hava staðið fyri meginpartinum av framleiðsluni av vanligu ítróttasendingunum. Til ítróttasendingina 3-2 hevur Kringvarpið brúkt fríyrkismyndafólk og fríyrkisprogrammfólk til hvørja sending. Kringvarpið hevur havt góðar royndir av hesi loysn. Guðstænastur og møtir á sjónvarpsskránni hava verið framleidd av fríyrkisfólki gjøgnum drúgt áramál. Morgunlestrar og Hetta Heilaga Evangeliið Skrivar í útvarpinum verða framleidd av fríyrkisfólki, eins og fríyrkisfólk standa fyri stórum parti av tónleikasendingunum í útvarpinum. Deyvatulkingin av Degi og Viku verður gjørd uttan fyri húsið. Eisini verða fríyrkisfólk brúkt í sambandi við framleiðslu av sjónvarpssendingum, eitt nú alt tilfarið til ungdómsmiðilin biit.fo. Kringvarpið hevur samanumtikið góðar royndir við at keypa tænastur frá fríyrkisfólki til programmframleiðslu.

**Partur av tilbúgvingini**

Kringvarpið er partur av Tilbúgvingarskipan Landsins. Avvarðandi myndugleikar hava listar við nøvnum og telefonnummrum, ið skulu nýtast, kemur samfelagið í eina støðu, har tørvur er á tilbúgving. Tað merkir, at Kringvarpið eftir eina lítla løtu kann varpa út, um eitthvørt álvarsamt hendir. Kringvarpið hevur nakrar ferðir sent tilbúgvingarútvarp í sambandi við ódnarveður. Sent verður út á kvøldarnar og náttina við.

KRINGVARP
FØROYA